Í Grundini:

# Her skal danses!



Mynd: Sunva E. Lassen

**- Hetta er bara tað besta staðið eg nakrantíð havi framført á! Sigur ovurfegin Nettie. Hon hevur verið DJ í nøkur ár í dansistøðum í metropolinum London. Slík dansistøð eru ofta kjallarar, undir grund, dimmlitt og fylt við sveittandi, dansandi ungum. Í Grundini – og hetta er í fjøruni í Syðrugøtu – osaði eisini av urbaniteti, men hugdi tú upp úr dansinum og sansaði umhvørvið, var tað ómøguligt ikki at leggja til merkis fjørin og fjøllini, ið gjørdu góðu vibratiónirnar betri.**

*Fleiri nýttu dansitónleikin í Grundini. Tað var serliga seint um kvøldarnar at gólvið fyltist. Bryn og James-James spældu hóskvøldið, Metronomy & Nettie fríggjakvøldið og DJ Knýtil og Lucy Hill stýrdu leygarkvøldinum.*

G! FESTIVAL 2007
*Johan Jacobsen*
*Johan@sosialurin.fo*

Gamla fiskavirkið er aftur tikið í brúk – hesaferð til dans afturvið frískum techno -og electronica-tónum úr Bretlandi og evropeiska meginlandinum. Grundin er sum vera mann illa farnir betongveggir, júst teir røttu karmarnir til nakað sum DJ-ing, rave-parties og hvat tað nú kann eita.

Maskinaríið, teldur og onnur útgerð, ið hoyrir DJ-fakinum til, koyrdi inntil árla á morgni. Betonggólvið undir DJararunum var onkuntíð nærum fylt við dansandi festivalgestum og aðrar tíðir næstan heilt tómt, soleiðis var tað um dagin. Einu løtuna, nakað væl áðrenn midnátt, stóðu bara tríggir ungir mans, ið neyvan fara at gera dans til karrieru, og fyltur sær upp í nevið. Mannskapið uppi í DJ-torninum var ta løtuna í meiriluta. Scenan var tann klassiska, eins og í flest øllum dansistøðum, summi trína í dansin og leika í, meðan onnur halda seg aftur og hyggja at, kanska hvíla seg ella práta við vinfólk.

Grundin liggur beint við vegin, har alt fólkið annars gekk framvið, og soleiðis fungeraði staðið væl fyri tann, ið fekk lyst til at sláa seg leysan á betonggólvinum eina løtu. Tá ið hetta bleiv ov keðiligt kundi ein fara aftur í tjaldingarleguna ella hyggja til restina av G´07-tónleikaskránni.

Hevði William Heinesen verið einastaðni millum 18-25 ár í 2007, so hevði hann eisini avgjørt sligið seg leysan á betonggólvinum – og tá hevði hann uttan iva farið suðuraftur við eini rúgvu av good vibrations í skjáttuni. Og so hevði hann skrivað skaldsøguna Her skal danses!





Mynd: Sunva E. Lassen





Mynd: Sunva E. Lassen

# Í Grundini gott, men...

**Meðan nýggi pallurin, Grundin, riggaði stak væl til DJ tónleik og upphiting til bólkarnar á G! og eisini til eftirball, so høvdu kenslubornu røddirnar hjá dugnaligu tónleikarunum Jensinu Olsen og Guðrið Hansdóttir uppiborið eina meira intima og ikki minst innilokaða senu.**

HUGLEIÐING
*Dánial Hoydal*

At hava konsertir í Grundini er eitt stak gott hugskot. Hugskotið hjá G! at brúka grundina til tónleik er feitt. Originalt og øðrvísi, og tí ógvuliga G!sligt. Tíverri riggar tað ikki so væl til inniliga stílin hjá singer-sangskrivarunum. Jensina Olsen og Guðrið Hansdóttir eru kanska bestu nýggju syngjandi songrøddirnar, vit eiga her heima, og tær høvdu uppiborið betri pall enn bumbaðu, sundurbrotnu grundina ovarliga í bygdini.

## Altjóða støði

Hóast hetta, megnaðu tær tað ógvuliga væl. Løgini eru original, og røddirnar tað sama. Tær hava altjóða støði, onki minni. Og sambandið við áskoðararnar var stak gott. Stílurin riggar ikki til stóra pallin á sandinum hjá G!, so tí er ilt at hugsa sær annað enn Grundin. Púra rætt av G! at bjóða teimum við, um festivalurin vil varðveita imageið sum progressivi og nýskapandi pallurin í Føroyum. Men teimum átti at verið unt betri pall ella betri ljóðumstøður, um tað altso ber til á open air festivalinum G!

## Áheitan

Konsertir í Grundini eiga heilt vist at halda fram. Men G! eigur at hugsa um, hvørt tað ber til at skapa eina meira intima senu. Tendensurin er greiður, at sera nógv av evnaríku, ungu tónlistafólkunum í Føroyum júst nú hava ein einfaldan, akustiskan, intiman stíl, sum egnar seg til smærri pallar. Áheitanin til G! 2008 má tí vera at skapa eitt alternativ til Spæliplássið og Grundina, sum gevur rúm fyri mongu dugnaligu intimu tónleikarunum í Føroyum. Men rós til festivalin fyri at skapa nýggja pallin, Grundina, sum er eitt hitt. DJ tónleikurin er akkurát G! Og gestirnir taka hann til sín, tað er onki at ivast í. G!o for it!